tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Kapping um almennan pening

## *Oddagrein*

Ætlaðu broytingarnar í lógini fyri Landsbanka Føroya eru endaðar sum ein kastibløka millum peningastovnarnar, sum tosa um ólíka kapping, og fíggjarnevndina, sum í fyrstani var so at siga púra samd, men sum nú er purrað út á frívaktini.

Málið snýr seg frá myndugleikanna síðu um, hvør skal umsita almennu fíggjarognirnar. Landsstýrið hevur við uppskotinum sagt, at tað skal landsbankin gera, men peningastovnarnir vilja eisini fegnir gera tað.

Støðan er í løtuni tann, at landsbankin umsitur fíggjarognirnar hjá landskassanum. Hetta verður gjørt eftir marknaðartreytum og á tann hátt ger bankin av hvussu stórur partur av peninginum skal vera í føroyska samfelagnum og hvussu stórur partur skal plaserast uttanlands. Verða broytingarnar samtyktar og tekur landsstýrið neyðugu avgerðirnar, so fær landsbankin eisini atgongd til at umsita gjaldføri hjá almennum stovnum, sum í løtuni liggur hjá peningastovnunum.

Vinnur uppskotið frama, er avleiðingin fyri peningastovnarnar, at teir skulu bjóða upp á innlánini. Tað merkir, at peningastovnarnir skulu kappast móti hvør øðrum fyri at útvega sær sjálvum innlán, og tað er ein stór broyting. Tað merkir, at peningastovnarnir skulu bjóða kundunum betri rentu og tað merkir aftur, at kostnaðurin hjá peningastovnum hækkar. Sum støðan er í dag, er eingin kapping um henda pening og tað er heldur eingin miðsavnað stýring av almenna gjaldførinum.

Myndugleikarnir hava mett tað vera neyðugt at gera eina miðsavnaða fíggjarognarstýring, fyri at fáa eina betri samlaða stýring og eitt betri avkast. Samstundis verður léttari hjá myndugleikunum at halda eftirlit við, hvat almenna gjaldførið verður brúkt til, og havandi gongdina í áttati-árunum í huga, er tað ikki so torført at skilja.

Sum tað kom fram í Krosskasti mikukvøldið, so snýr broytingin seg eisini um at seta á stovn ein virðisbrævamarknað. Hesum hevur landsstýrið arbeitt við í longri tíð, men hóast peningastovnarnir hava staðfest, at tað er politiskur vilji fyri virðisbrævamarknaðinum, so er ikki vist, at teir eru so fegnir fyri at hann kemur. Eydnast virðisbrævamarknaðurin, er kappingarstøðan á útlánsmarknaðinum ein onnur enn hon er í dag, og tað merkir, at peningastovnarnir ikki av sær sjálvum fáa allar lántakarar sum kundar. Tá kunnu tey, sum hava neyðugt kreditvirði bjóða út virðisbrøv til keyps á marknaðinum. Somuleiðis fáa íleggjararnir eitt alternativ, tí ístaðin fyri at seta peningin á bók ber til at keypa sær virðisbrøv.

Hesum eru føroysku peningastovnarnir eftir øllum at døma bangnir fyri og tí berjast teir í móti við hond og fót.

Støðan er tann, at tað snýr seg ikki um at taka frá peningastovnunum bara fyri at taka, men fyri at geva føroyska samfelagnum fleiri møguleikar og betri avkast, samstundis, sum stýringin av fíggjarognum landsins verður miðsavnað, og tað áttu peningastovnarnir eisini dugað at skilt.

*Sosialurin*

Viðmerking:

# Privatisering og útlisitering

Privatisering kann verða eitt amboð til at flyta uppgávur frá tingmonnum og landsstýri út til feløg og persónar. Hetta er í sær sjálvum einki endamál, men tíðarrákið við sterkum fagfeløgum ger privatisering til eitt hent amboð fyri at fáa flexibilitet í arbeiðsmarknaðin, soleiðis at palliba fær sum mest fyri sínar pengar, samstundis sum starvsfólk skapa so nógv virðir sum møguligt.

### Ov nógvar almennar tænastur!?

Tað er neyðugt at ansa eftir, at allir pengar ikki enda sum almennar lønir. Í almenna sektorinum tykist tað vera trupult at skilja, at tey veita tænastu til onnur. Almenn fagfeløg eru sera sterk, og er tað ikki bara gott. Vansin er, at umhugsni fyri starvsfólkunum til tíðir tykist verða størri enn umhugsni fyri brúkaranum/kundanum. Tað er í dag ikki møguligt at tillaga almenna sektorin, tí fakfeløgini krevja, at alt verður við tað gamla.

Rættari hevði verið, at brúkarin segði, hvat hann vil hava, heldur enn at starvsfókini siga, hvat tey vilja bjóða. Hetta hevði uttan iva betra munandi um tænastuna, og palliba hevði verið munandi betur nøgdur við tænastuna. Er tað rímuligt, at palliba skal gjalda fyri nakað, sum hann ikki vil hava??

### Tænastur eftir tørvi

Hetta skal ikki skiljast soleiðis, at starvsfólk hjá tí almenna fáa ov nógv í løn, ella ikki gera sítt arbeiði til lítar. Nei, rættari er at siga, at tey í dag veita nakrar tænastur, sum tørvur ikki er á.

Tí áttu tey at verið sinna at tosa um broytingar í almenna sektorinum, sum eisini høvdu givið teimum fyrimun.

Um palliba fær fleiri tænastur sum hann er glaður fyri, vil hann uttan iva gjalda. Støðan í dag er, at palliba betalur bæði fyri tað hann vil hava, og tað hann ikki vil hava. Tí megnar hann ikki at gjalda fullan prís fyri tað hann fær.

### Stig fyri stig

Um vit fara hóvliga fram, ivist eg onga løtu í, at tað ber til at betra tænasturnar og lække prísin munandi.

Tað eru teir, sum siga, at



hetta ber ikki til. Men søgan prógvar at tað ber til. Hygg bara at tryggingini. Síðan vit fingu kapping, eru prísirnir farnir í botn, og tænastan betra. Nú eru tey á Tryggingini eisini farin at siga Tygum við okkum.

### Tómar tunnur buldra mest

Eg vil staðiliga mæla til varsemi í samband við privatisering. Mín uppfatan er, at teir, sum í dag tosa mest um privatisering eru teir, sum hava prógva, at teir IKKI duga sum vinnulívsmenn.

Her hugsi eg serliga um fólkafloksmenn, men má eg tó ásanna, at hetta ikki er fremmant í Sambandsflokkinum. Slíkir menn eru neyvan teir bestu at sannføra onnur.

### Fortreytir mugu verða í lagi

Fyri at fáa fulla nyttu burtur úr privatisering skulu fortreytirnar vera í lagi. Hesar eru m.a. Persónar/fyritøkur sum megna uppgávuna. Neyð-ugt er at vit hava fleiri at velja ímillum, fyri at tryggja, at talan veruliga gerst um sparingar og hægri tænastustøðið.

Smápartafeløg við kr. 80.000 í partapeningi eru ikki hóskandi til endamálið. Hvat hevði Jógvan við Keldu sagt, um Dúgvan ikki sigldi, tí Sp/f Klaksvíksleiðin fór á húsagang?

Tí vil eg heita á menn um at fara varliga fram. Neyðugt er eisini at fáa allar partar við. Bæði starvsfólk, politikarar og palliba skulu taka undir við ætlanum, fyri at talan skal gerast um veruliga munadyggar loysnir.

At enda vil eg minna á, at tað er líka mikið fyri skattgjaldaran, um tað er landskassin ella tað privata, sum misnýtir pengar hansara.

**Eivind Jacobsen**
**Strendur**

# Ábyrdarleysur politikkur

**Eftir at núverandi loysingarsamgonga hevur stýrt samfelagnum í hálvtannað ár, hevur hetta tíðarskeið verið merkt av ruðuleika og ótryggleika. Lemjandi verkføll eru vorðin hvønndagskostur.**

Limirnir hjá Starvsmannafelagnum vóru teir fyrstu, sum noyddust út í eitt drúgt verkfall, fyri at tey eisini kundi fáa tað, sum tey høvdu uppiborið í lønarvøkstri, á líkafóti við tinglimir løgtingsins.

Ruðuleikin heldur fram. Nú um dagarnar blivu ikki minni enn tveir sjúkrabilar sleipaðir aftur til landssjúkrahúsið, tí peningur ikki er til viðlíkhald. Men í sama bygningi í teimum ovaru hæddum verður peningur nýttur í ólukkumát til at umbyggja, tí almanna- og heilsumálastýrið heldur til har.

Landstýriskvinnan prioriterar seg og síni fram um tey sjúku og veiku í samfelagnum. Var tað ikki upp á sítt pláss, at hon fyrst fekk Landsjúkrahúsið at virka og harvið vísti ábyrgd yvir sínum málsøki?

### Stríð um dagstovnar og dagrøkt

Um vit eitt nú taka løgtingsmál nr. **29/1999 : Uppskot til løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt,** so kann ein og hvør fara inn á www.løgting.fo og víðari inn á trivnaðaranevndina. Hyggja inn á áðurnevnda løgtingsmál og undir **C** nevndarskjøl og **Y** (bræv frá Helenu Dam á Neystabø til Trivnaðaranevndinia), har hon sera ósømiliga niðurger arbeiðið hjá Trivnaðarnevndini. Skjal **Z** (bræv frá Trivnaðaranevndini til Helenu), har Trivnaðarnevndin slær fast, **at hon sum partur av løggevandi valdinum á ongan hátt kann góðtaka brævið frá Helenu Dam á Neystabø, dagfest 22. mars 2000. Ein samd trivnaðamevnd heitir tí á landsstýrismannin um í stundini at taka aftur viðmerkingarnar soleiðis, at málið fær ein sømiligan enda beinanvegin.**

Sum ein flongdur hundur er hon noydd at taka alt í



seg aftur og sendir soljóðandi skriv til trivnaðarnevndina: **Metir Trivnaðarnevndin ikki, at viðmerkingar Almanna- og heilsumálastýrisins tæna sínum endamáli, verða tær við hesum tiknar aftur. Undirskrivað Helena Dam á Neystabø, landstýrismaður.**

Kann ein landstýrismaður tíggja sær soleiðis, hetta er stór skomm fyri landstýriskvinnuna, at hon á hendan hátt viðger eitt so álvarsligt mál sum løgtingsmál nr. 29/1999: **Uppksot til løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt.**

### Nýggjar lógir, men eingir pengar

Og nú eru vit enn einaferð rakt av einum lemjandi verkfalli. Skúlabørnini eru vorðin gíslar í stríðnum millum tvey aðalstýri, nevniliga fíggjarmálastýrið øðrumegin og mentamálastýrið hinumegin. Tann nýggja fólkaskúlalógin er samtykt av Føroya Løgtingi, uttan at neyðugar avleiðingar verða tiknar, nevniliga at játta peningin til lóginia.

Men hettar er ikki nakað nýtt fyribrigdi hjá sitandi samgongu. Taka vit Skálafjarðarsiglingina, so hevur løgtingið samtykt eina lóg um, at sjóvegis samband skal verða millum Skálafjørðin og Havnina. Men hvat! Enn einaferð hevur løgtingið samtykt eina lóg uttan at taka neyðugar avleiðingar, nevnliga at játta peningin til lóginia.

Hettar er nakað av tí, vit kunna vænta okkum í framtíðini.

**Annfinn Brekkstein**

**www.sosialurin.fo**






# Stívrenda kósin heldur fram

*Danski forsætisráðharrin heldur fram við stívrendu kósini, hann legði lunnar undir fyri kortum. Fullveldið kostar. Ynskja føroyingar fullveldið, ja, so skal blokkurin avviklast eftir trimum til fýra árum*

Grækaris Djurhuus Magnussen úr Keypmannahavn

Danska stjórnin er ikki vikað ein tumma síðani fyrireikandi rumbulfundin herfyri. Á fólkatingsins røðarapalli í gjár sló danski forsætisráðharrin rimmar fast, at velja føroyingar fullveldið, so kostar tað búskaparliga. Tað merkir beinleiðis, at blokkstuðulin skal avviklast eftir bara trimum ella fýra árum.

Danski forsætisráðharrin legði dent á, at stjórnin vónar, at føroyingar verða í ríkisfelagskapinum, soleiðis at vit hava tríggjar partar á jøvnum føti: Danmark, Føroyar og Grønland.

Men eg havi so mangan sagt, at tað eru føroyingar sjálvir, ið gera av, hvørt teir vilja hava fullveldið ella ikki. Tað skal bara vera púra greitt, at skal eitt sjálvstøðugt land føra ábyrgdarfullan búskaparpolitikk, so nyttar ikki við stuðli úr øðrum londum. Tað má viðkomandi land megna sjálvt. Og tað merkir aftur, at Føroyar ikki skulu vænta búskaparligan stuðul úr Danmark, segði Poul Nyrup Rasmussen.

### Ræði í uttanríkismálum

Okkurt nýtt kom fram í røðuni hjá danska forsætisráðharranum. Hann segði millum annað, at velja føroyingar eitt rúmari sjálvstýri innan ríkisfelagskarmarnar, so eru møguleikarnir nógvir. Millum annað kann løgmaður fáa fult ræði í uttanríkismálum, sum viðkoma Føroyum. Til ber eisini hjá føroyingum at fáa fult ræði á økjum sum dómsvaldi, politivaldi, familju- og almannamálum og líknandi, ynskja føroyingar tað.

- Men eg skal bara undirstrika, at so hvørt málini verða yvirtikin, so taka føroyingar eisini búskaparligu ábyrgdina av hesum økjum, segði forsætisráðharrin.

Undan samráðingunum við donsku stjórnina hevur landsstýrið borið ótta fyri, at danska stjórnin, við stuðuli úr fólkatinginum, fór at koma við sínum egna alternativa uppskoti til sjálvstýrisloysn. Tað var júst hetta, ið hendi í 1948, tá ætlanirnar um fullveldi endaðu við Heimastýrislógini. Men Poul Nyrup Rasmussen segði í røðu síni í gjár, at tað kemur onki alternativt uppskot frá dønum.

-Vit samráðast út frá einum



*Áhoyrarar í Fólkatingunumí gjár. Mynd: Føroyska Tíðindastovan*

einsata uppskoti, og tað er landsstýrisins upplegg, segði forsætisráðharrin.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við sjálvstýrismálum, fegnast um, at danska stjórnin ikki kemur við nøkrum alternativum uppskoti. Hann heldur, at nú veit landsstýrið, hvørjum samráðst verður út frá.

Men Høgni Hoydal heldur lítið um lyftið hjá forsætisráðharranum um, at Føroya løgmaður skal fáa fult ræði í uttanríkismálum.

- Hatta loysir onki. So leingi vit ikki hava fullveldið, liggur evsta valdið í Danmark, og ikki í Føroyum, sigur Høgni Hoydal.

Men formanni javnaðarfloksins, Jóannesi Eidesgaard, dámar væl útspælið hjá Poul Nyrup Rasmussen.

- Hatta vísir bara, hvussu rúmar ræsur vit í veruleikanum hava innan ríkisfelagskarmarnar. Okkum nýtist ikki fullveldið, sigur hann.

### Missa blokkin kortini

Framsøgumaðurin hjá Sosialdemokratiska flokkinum bresti eina bumbu í fólkatinginum. Hann segði, at uttan mun til um føroyingar velja fullveldið ella størri sjálvræði innan ríkisfelagskarmarnar, so verður blokkstuðulin tikin av. Hetta hóvar landsstýrismanninum við sjálvstýrismálum.

- Hatta undirbyggir jú, at vit tað sama kunnu taka fullveldið. Tað kostar tað sama sambært framsøgumanninum hjá sosialdemokratunum, Jan Petersen, sigur Høgni Hoydal.

### Nyrup bað um umbering

Á fólkatingsins røðarapalli í gjár bað Poul Nyrup Rasmussen føroyingar um umbering fyri, at teir í fjølmiðlunum hava verið gjørdir til eina útreiðslu fyri danska ríkiskassan.

- Mongu føroyingarnir í Danmark eru ongin útreiðsla, beint øvugt. Føroyingar eru millum annað eitt stórt tilfeingi í donsku fiskivinnuni, og vit eru sum heild ógvuliga fegin um at hava føroyingar í Danmark. Útrokningin, sum hevur verið frammi í fjølmiðlunum, og sum hevur gjørt føroyingar upp í tølum, var ikki ætlað at seta niður á føroyingar, men skuldi bara vera ein útrokning av mongum, segði danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen.

Orðaskiftið í fólkatinginum var ikki liðugt, tá blaðið fór til prentingar.

# Brutu inn á sovandi mann

*Tá óbodnu gestirnir varnaðust, at fólk var inni, tóku teir til beins. Løgreglan hevur tikið annan av óhepnu gestunum*

Dagfinn Olsen

Ein maður í Havn fór stillisliga til songar umleið klokkan 23:30 mikukvøldið. Góðan tíma seina, klokkan 12:30, hoyrdi maðurin tos uttanfyri og tað ljóðaði, sum vildi onkur sleppa inn.

Tað ljóðaði sum tveir mans og annar segði: „Nei, ikki bróta inn“, greiðir maðurin í húsinum frá.

Maðurin inni ringdi til løgregluna, tá tað byrjaði at skava við úthurðina. Tá hurðin varð brotin upp, stongdi maðurin seg inni á wc'num, tí hetta var einasta rúm, hann hevði lykil til.

Hann rópti á óbodnu gestirnar og spurdi hvat teir vildu.

Tá óbodnu gestirnir varnaðust, at fólk var inni, tóku teir til beins.

Løgreglan tók seinni annan mannin og sigur seg vita, hvør hin er.

# Lærarar herða verkfallið og skipa fyri tiltaki

*Sunnudagin skipar samskipanarbólkurin fyri friðaligum tiltaki á Vaglinum í Havn*

Dagfinn Olsen

Tað ljóðar, at lærarar hava ætlanir um at herða verkfallstiltøkini komandi dagarnar. Møguliga er talan um at blokera skúlar.

Ein samskipanarbólkur tekur sær av ymsum í samband við arbeiðssteðgin hjá lærarum. Bólkurin avvísir ikki, at talan verður um at herða tiltøkini komandi dagarnar, men ikki er gjørligt at fáa tíðindini váttað.

Tó siga lærarar, ið blaðið hevur prátað við, at teir hava fingið boð um at vera tøkir komandi dagarnar.

### Á Vaglinum

Hinvegin er greitt, at eitt friðaligt tiltak verður á Vaglinum í Havn sunnudagin. Á skránni er sangur og røður. Røðarar vera frá Føroya Lærarafelag ein skúlanæmingur heldur røðu og eisini verða aðrir røðarar.

Tiltakið á Vaglinum byrjar klokkan 16.